# Brúdleyp

Leygardagin 15. mai giftist í Svenstrup Kirke Alexandrina Abrahamsen Petersen, Fuglafjørður og Mads Grosen Jørgensen, Hadsten. Adr.: Gulspurvevej 9, 9230 Svenstrup.



Leygardagin 15. mai giftast Maiken við Skipá og John Pedersen, Havn. Vígslan verður í Filadelfia í Havn kl. 14. Veitslan verður hildin á Hotel Føroyum kl. 19 fyri innbodnum.

Leygardagin 15. mai giftast Ann Lamhauge, Lambareiði og Bergar Hvannastein, Haraldsundi. Vígsla verður í Glyvra kirkju kl. 13. Døgurði verður fyri innbodnum. Frá kl. 19 verður opið hús í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum, har øll eru hjartaliga vælkomin at gleðast saman við brúðarparinum.



Leygardagin 22. mai giftast Eyðstein Jacobsen og Karina Joensen, Tórshavn. Vígslan verður í Hvalbiar kirkju kl. 14, og brúdleypið verður í Roynhøllini kl. 18 fyri innbodnum. Brúðarhús verður dagin eftir og øll eru hjartaliga vælkomin.

Leygardagin 22. mai giftist í Hasle kirke í Århus, Sidsel Thorsteinsson ( dóttir Bergur Thorsteinsson, sála) og Anders Sølvsten. Tey eru búsitandi á Tage Hansensgade 3, 1th., 8000 Århus C.



Leygardagin 22. mai kl. 14 giftast í Matheus kirkjuni í Keypmannahavn Anna Maria Káradóttir Durhuus Samuelsen og Danny Sten Olsen, Herning. Brúdleypsadr. er: c/o Hjørdis Samuelsen, Saltøvej 8, 2665 Vallensbæk Strand.



Leygardagin 12. juni giftast Annbritt B. Poulsen, Skála og Klæmint Lamhauge, Glyvrar. Tey, ið ynskja at gleða okkum á okkara stóra degi eru hjartaliga vælkomin til vígslina og reseptiónina, ið verður í Kelduni kl. 13. Døgurði verður fyri innbodnum í Pensionistahúsið á Strondum kl. 19.

Leygardagin 12. juni giftast Ellen Ombe Belen, Puerto Princesa City - Palawan og Richard Herup Johansen, Miðvágur. Vígslan verður í miðvágs kirkju kl. 15 og veitslan verður í bygdarhúsinum í Miðvági kl. 19. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá innan 27. mai á tlf. 213785 ella teldupost: e_o_b@hotmail.com.

Leygardagin 3. juli giftast Martha Ellingsgaard og Hávarður Joensen. Vígslan verður í Mizpa á Eiði kl. 13. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá innan 11. juni á tlf. 260482 ella maehaj@gmail.com.



Leygardagin 3. juli giftast í Funningskirkju, Jannet Hansen, Sørvágur og Kristian S. Johannesen, Funningur. Veitslan verður í Funningi kl. 18. Tey, ið vilja halda dagin saman við okkum verða vinarliga biðin um at siga frá innan 6. juni við at ringja 253745 (Jannet) 283235 (Sluva).



Leygardagin 10. juli giftast Guðrun Justinussen, Hvalba og Símun Kerá, Hellurnar. Vígslan verður í Hvalbiar kirkju kl. 14, og veitslan verður í Roynhøllini kl. 18.30. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin at siga frá innan 13. juni, við at ringja 224727 (Guðrun), 510054 (Símun) ella 310054 eftir kl. 16.

Leygardagin 14. august giftast á Kirkju (Fugloy) Liljan Jakobsen úr Skopun og Jóanis Christiansen úr Klaksvík. Brúdleypið verður í Bygdahúsinum í Lorvík. Tey sum ynskja at gleða okkum við at koma í brúdleyp, mugu siga frá áðrenn 25. juli á tlf.+298 274440, +298 217838, +298 457838 ella á teldupost: Joa@post.olivant.fo ella liljanjakobsen@hotmail.com.

Leygardagin 28. august giftast Anna Hansen, Søldarfjørður, og Bogi Simonsen, Klaksvík. Vígslan verður í urtagarðinum uppi á Gørðum í Søldarfirði kl. 11. Veitslan verður í Betesda í Klaksvík kl. 17. Tey, ið ynskja at gleða okkum við at koma í veitslu, verða biðin at siga frá innan 23. juli á tlf. 226102 (Anna) ella á tlf. 718191 (Bogi).

Fríggjadagin 28. august giftast Petrina Maria Berg og Carl á Lag. Vígslan verður í Havnar kirkju kl. 16. Brúdleypið verður á Hotel Føroyar kl. 19.30 fyri innbodnum.

# Tiltøk

**Gudstænastur 16. mai**
**Havnar kirkja:** kl. 11
Ann D. Hansen
**Hoyvíkar kirkja:** kl. 11
Jógvan Fríðriksson, biskupur, altargongd, skriftamál
kl. 10.40. Sunnudagsskúli er undir gudstænastuni.
**Vesturkirkjan:** kl. 11
Bergur Debes Joensen og Hans Ole Bækgaard. Sunnudagsskúli er undir gudstænastuni
**Nólsoy:** Kl 12
Niels Pauli Danielsen
**Æðuvík:** kl. 11
Martin R. Jacobsen
**Hósvíkar kirkja:** kl 11
Henning Bøgesvang
**Christianskirkjan:** kl. 11
Kjartan Mørkøre
**Viðareiði:** kl. 11 Hanus á Gørðum, barnaguðstænasta
**Skála:** kl. 11
Símun P Jacobsen, altarg.
**Norðskáli:** kl. 11 messa (morgunmatur í møtisalinum í kirkjuni kl. 9.30) Emil Olsen
**Miðvágur:** kl. 11
David Johannesen
**Tvøroyri:** kl. 11
Jónsvein Bech
**Fuglafirði:** kl. 11
Magnus Brahé Jørgensen
**Øravík:** kl. 13
pílagrímsgudstænasta. Eftir gudstænastuna verður gingið eftir varðagøtuni niðan á Mannaskarð og haðani til Fámjins, har endað verður við gudstænastu í kirkjuni uml. kl.16. Eftir ta gudstænastuna verður boðið til ein drekkamunn í Vesturhøll
**Rituvíkar kirkja:** kl. 11
Meinhard Bjartalíð, altarg.
**Glyvra kirkja:** kl. 11
lestur og sunnudagsskúli.
Kl. 20 Kór Glyvra kirkju hevur Várkonsert
**Søldarfjørður:** kl. 11
lestur og sunnudagsskúli
**Porkeri:** kl. 12
Uni Næs
**Sandvík:** kl. 12
John Myllhamar.
**Skála:** kl. 11
Símun P Jacobsen altarg.
Talvan gongur fyri føroysku heidningamissiónina hja Kirkjuliga missiónsfelagnum

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10 barnabíbliutími og bíbliugransking. l. 11 Gudstænasta Jens V. Danielsen.

**Pílagrímsgonga**
Sunnudagin 16. mai kl. 13 verður skipað fyri eini pílagrímsgongu frá Øravík til Fámjins. Byrjað verður við stuttari gudstænastu í Bønhúsinum í Øravík. Síðan verður gingið eftir varðagøtuni um Tingstovuna niðan á Mannaskarð. Har verður ein steðgur, og vit eta matpakka, sum tey luttakandi sjálvi hava við sær. Síðani verður gingið til Fámjins, har endað verður við stuttari gudstænastu í kirkjuni. Á vegnum verða eisini nakrir steðgir, t.d. við ein varða og ein áarløk, har komið verður við nøkrum hugleiðingum og sálmar verða sungnir. Væntandi kemur túrurin at taka umleið 3 tímar. Fólk letur seg í eftir umstøðunum.

**Katólska kirkjan**
Fríggjakvøldið kl. 19.30 verður rósukransbøn í Mariukirkjuni. Leygardag kl. 7.30 messa í Kerit. Kl. 11.30 kórið "Glymur" hava ein Martiée í Mariukirkjuni. Øll eru vælkomin. Sunnudagin kl. 11 hámessa v/Michael Bradley, prestur í Mariukirkjuni. sunnudagsskúli kl. 14.

**Meinigheitshúsinum í Havn**
Sunnudag kl. 14
Oyngin sunnudagsskúli.
Kl. 18 Onki møti vegna ársmøti í Hoyvíkshøllini.

**Fríkirkjan Oasan** *Kirkjustræt*
Fríggjakvøldið kl. 19
After8, sunnudagin kl. 11 Guðstænasta v/Símin Absalonsen, kl. 12 sunnudagsskúli. Verið vælkomin.

**Ársmøtini hjá Heimamissiónini 14.-16. mai.**
Fríggjakvøldið Kl. 19.30
Stórmøti í Hoyvíkshøllini.
Evni: "Her eri eg – send meg!"
Tala: Torleif Johannesen, sjómanstrúboðari. Sangur: Streingjakórið í KFUM&K.
Barnaansing fyri børn undir skúlaaldri. Høvi at geva gávu til Útimissión. Drekka.
Kl. 22 Sang- og vitniløta í Hoyvíkshøllini, Pastor Timothy og Sieng Lai úr Kambodja luttaka.
Leygardagur kl. 9 Bønarløta og morgundrekka (Meinigheitshúsið í Havn). Kl. 10 Ársfundir í Meinigheitshúsinum í Havn.
1. Barnaarbeiðið Marjon Poulsen, barnaráðgevi: "So stóran týdning hevur tú!"
2. Leiðsluforum (einans fyri stýrisformenn og ungdómsnevndarformenn): Maureen D. Clarke: "Hvussu møta vit menniskjum úti á markini?" 3. Fyri øll Pallborðsfundur: "Sama møti fyri allar aldursbólkar?" 3 upplegg og orðaskifti. Barnaansing fyri børn undir skúlaaldri. Kl. 13 "Heimamissiónin – tað eru vit!" í Meinigheitshúsinum í Havn. Stuttur samandráttur frá fyrrapartinum Formansfrágreiðing v/Thomas Dam, formanni. Fíggjarfrágreiðing v/Jørmund Foldbo, fíggjarleiðara. Drekka, Heilsanir (frá útitrúboðarum, Indre Mission o.ø.) Samrøður, Orðaskifti.
Kl. 19.30 Veitslumøti í Hoyvíkshøllini. Evni: "Sendiboð í Krists stað" Tala: Thomas Dam, formaður. Sangur: VOX. Spennandi innsløg frá markini, heima og úti. Barnaansing fyri børn undir skúlaaldri. Høvi at geva gávu til HeimaMissiónsUngdóm. Drekka. Kl. 22 Ungdómstiltak í Hoyvíkshøllini. Sangur: VOX. Pastor Timothy og Sieng Lai úr Kambodja luttaka.
Sunnudagur kl. 11
Gudstænasta í Hoyvíkarkirkju. Kl. 10.40 Skriftarmál. Prædika: Jógvan Fríðriksson, biskupur. Altargangur. Kl. 14 Sunnudagsskúli í Hoyvíkshøllini. Klaksvíkingar framføra sangleikin "Kongurin kemur". Høvi at geva gávu til barnaarbeiðið. Kl. 14 Juniortiltak í Meinigheitshúsinum í Havn. Kreativ framførsla, sangur, tala og annað. Kl. 17 Stórmøti í Hoyvíkshøllini. Evni: "Verðið sátt við Gud!" (sjónvarpað) Tala: Pól Johannessen, trúboðari. Sangur: Taborkórið. Tulkað verður fyri deyvum. Barnaansing fyri børn undir skúlaaldri. Høvi at geva gávu til Heimamissiónina. Drekka.

**Ebenezer**
Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans. Barnaansing er meðan møti er. Osmund Justinussen talar. Kl. 12 Sunnudagsskúli. Kl. 18 Evangelisktmøti. Barnaansing er meðan møti er.

**Frelsunarherurin Tórshavn**
*Tórsgøta 19*
Leygarkvøldið kl. 20 Møti v/ Roger Larsson.
Sunnudagin Kl. 11 morgunmøti v/ Roger Larsson
Kl. 11 Sunnudagsskúli
Kl. 17.30 bønarløta
Kl. 18 Møti v/ Roger Larsson

**Lívdin**
Fríggjakvøldið kl. 21 á Brekku 3, Hoyvík, Tiltak fyri ung.
Leygarkvøldið ALIVE tiltak fyri ung kl. 21 í skúlanum við Løgmannabreyt.
www.ung.livdin.fo
Sunnudagur Í skúlanum við Løgmannabreyt. Familjumøtið kl. 10.30, tilbiðjanarmøti kl. 11 og lovsongur og tala kl. 12. Sunnudagsskúli og Ung-lív kl. 12. Á møtinum kl. 12 møtinum talar Jákup Jacobsen, evnið er: Varðveit hjarta títt.

**Samkoman Immanuel,**
*Brekkutún 5, Hoyvík*
Fríggjakvøldið kl. 19 Kongsins Herlið, børn 8-12 ár. Kl. 21 Herur Jákups, ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11.30 Barnakórið venur. Kl. 12 Møti v/sunnudagsskúla. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur. Øll eru vælkomin.

**Samkoman Marknagil**
*Fjalsgøta 2, Tórshavn*
Sunnudagin kl. 10.30 Breyðbróting.
Sunnudagsskúli kl. 12.
Kl. 18 Evangeliskt møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønar/uppbyggingarmøti.

**Filadelfia Tórshavn**
Leygardagin kl. 14 Brúðarvígsla. Kl. 21 Flare – Tóri Slættalíð talar.
Sunnudagin Kl. 11 Morgunmøti, Bergur Skovgaard talar.

**KFUM og KFUK í Havn**
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Seinnapartsamkoman við Hera Joensen presti. Evni: Kristi Himmalferð og Danmarkarferð. Broyting í skránni.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, Malan & Trúgvi Lützen syngja og tala.
Mánakvøldið kl. 20 lovsangs- og bønarløta.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoman**
*Yviri við Strond*
Sunnudag kl. 18 er Evangelisk møti. Øll eru vælkomin.

**Kollfjarðar Missiónshús**
Sunnudagsskúlin verður sunnudagin í Hoyvíkshøllini kl. 14 og møti verður eisini í Hoyvíkshøllini kl. 17 tí Ársmøtini eru har Bíbiltími verður týskvøldið kl. 20 v/ Hendrik T. Olsen.

**Frelsunarherurin Vágur**
Vitjan úr Svøríki.
Fríggjakvøldið kl. 20 møti v/ Evangelistinum Roger Larsson úr Svøríki. Ymisk sangluttøka. og forbønstænasta.
Sunnudagin kl. 11 Sunnudagsskúli. Kl. 18 evang.møti.
Mánakvøldið kl. 20 bønarløta
Týsdagin kl. 9.30 orðið á borðið.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Kl. 18 møti v/Elisabeth Leo og Hans Kristian Olsen.

**Meinigheitshúsið Vágur**
Sunnudagur kl. 13.30 Sunnudagsskúli kl. 18 Møti við Ásbjørg og Árna Kjærbæk.
Mánadagin Møti við luttøku av Timothy og Sieng Lai úr Kambodja.

**Saron Vestmanna**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti

**Hvalvík Missiónshúsið**
Einki møti sunnukvøldið, vegna ársmøti hjá Heimamissiónini.

**Kambsdalur, Handilsskúlin**
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Awake - ymisk luttøka.
Sunnudagin kl.17, Møti við Bergur Skovgaard. Sangur við Eyðun Jacobsen. Barnamøti kl. 17.

**Livsins Orð, Saltangará**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti

**Tabor, Toftir**
Leygarkvøldið fara vit til Havnar á møti. Bilar koyra frá missiónshúsinum kl. 18.15

**Getsemane, Stangaskákið 1**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti, barnamøti er samstundis.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti v/breyðbróting.
Hvønn gerandismorgun kl. 06.15 er morgunbøn.

**Soli Deo Gloria**
Sunnukvøldið kl. 18 møti.
Menninir hava orðið.
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti.
Tú ert hjartaliga vælkomin.

**KFUM & K í Klaksvík**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Kl. 17.30 Bønarløta
Kl. 18 Møti. Kl. 21 Ungdómsmøti

**Filadelfia Vágar**
Sunnudagin kl. 11 møti við Símin Jacobsen.
Sunnudagsskúli kl. 11:30.

**Missiónshúsið, Tvøroyri**
Sunnudagin kl. 14. sunnudagsskúli. Kl. 18 Møti.

**Tilhaldið í Tórsgøtu**
*Tlf: 316491/286491*
Guðrun Eltør fer at hava áhugavert skeið í Tilhaldinum 17.-21. mai frá kl. 9-15 í at seyma úr gomlum bundnum og kowboy. Vit seyma troyggjur, taskur, pútut og annað. Tilmelding: 316491.
Mánadagur Kl. 10 Fimleikur, Grete Ellingsgaard.
Kl. 14. Kortspæl o.o. spøl.
Øll eru hjartaliga vælkomin.